# Krabbameinsútgreining
# Útgreinan av krabba hjá børnum
# Krabbi í thorax, abdomen, beinagrind og bleytlutum

## Sjúkueyðkenni, ið skulu reisa mistanka til krabba í omanfyristandandi gøgnum

Illgruni til krabba í thorax hjá børnum tekur seg upp, tá eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkueyðkennum vísur seg:

- Hosti í meira enn 2 vikur
- Harður/týðiligur andadráttur, pína í bringuni, andaneyð ella øktar sjónliga æðratekningar
- Horner's syndrom
- Hækkað blóðtrýst
- Sjúkueyðkenni, ið ávirkað mergin (sí undir leukæmi)
- Almen sjúkutekin
  * Fepur uttan upplagda orsøk > 1 viku
  * Náttarsveitti
  * Vánaligur trivnaður
  *Húðskriði

Illgruni til krabba í abdomen hjá børnum tekur seg upp, tá eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkueyðkennum vísur seg:

- Palpabul tumor í búkinum
- Sjónligt blóð í urin
- Hækkað blóðtrýst
- Búkpína í meira enn 1 viku
- Tekin um obstruktión av maga-tarm ella urinleiðini, sosum
  * Kvalma
  * Spýggjan
  * Forstoppilsi
  * Ileus
  * Afturvendandi bløðrubrunar
  * Trupulleikar við vatnláti
- Hepato- ella splenomegali
- Tekin til hormonframleiðandi tumorar
  * Økt framleiðsla av binýrabarkhormon (Cushings)
  * Útvikling av kynsgøgnum uttan fyri vanliga pubertitetin
- Sjúkueyðkenni, ið ávirkað mergin (sí undir leukæmi)
- Almen sjúkutekin
  * Fepur uttan upplagda orsøk > 1 viku
  * Náttarsveitti
  * Vánaligur trivnaður
  *Húðskriði

Illgruni til krabba í beinagrind hjá børnum tekur seg upp, tá eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkueyðkennum vísur seg:

- Ryggpína í meira enn 2 vikur
- Tekin um trýst á nervarót (pína, heilt ella partvíst lamni)
- Tekin um trýst á møn (pína, heilt ella partvíst lamni í armi ella beini, óviljastýrd vatnlát ella opning)
- Patologisk brot
- Viðvarandi beinagrinds- ella liðpína > 1-2 vikur
- Palpabul tumor relaterað til beinagrind
- Sjúkueyðkenni, ið ávirkað mergin (sí undir leukæmi)
- Almen sjúkutekin
  * Fepur uttan upplagda orsøk > 1 viku
  * Náttarsveitti
  * Vánaligur trivnaður
  *Húðskriði

Illgruni til krabba í bleytlutum hjá børnum tekur seg upp, tá eitt ella fleiri av niðanfyristandandi sjúkueyðkennum vísur seg:

- Tekin um trýst á nervarót (pína, heilt ella partvíst lamni)
- Tekin um trýst á møn (pína, heilt ella partvíst lamni í armi ella beini, óviljastýrd vatnlát ella opning)
- Sjónligt blóð í urin
- Skjótveksandi bleytlutstumor
- Bleytlutstumorar > 5 cm hjá fullvaksnum børnum (minni hjá minni børnum)
- Allir bleytlutstumorar á ella undir fascie
- Sjúkueyðkenni, ið ávirkað mergin (sí undir leukæmi)
- Almen sjúkutekin
  * Fepur uttan upplagda orsøk > 1 viku
  * Náttarsveitti
  * Vánaligur trivnaður
  *Húðskriði

## Grundaður illgtuni

Grundaður illgruni íkemur, tá:

- Ífylla í thorax ávíst við røntgen ella øðrum myndamodaliteti
- Tumor í abdomen ávíst við UL ella øðrum myndamodaliteti
- Tumor í bleytlutum, ið gevur grundaðan illgruna til malignitet, ávíst á MR ella øðrum myndamodaliteti. Um MR krevur fulla doyving, eru aðrir myndamodalitetir nokk.
- Tumor í beinagrind, ið sær malignur út ávíst á MR. Um MR krevur fulla doyving, eru aðrir myndamodalitetir nokk.

## Kanningar hjá kommunulækna

Klinisk kanning av barninum og BR (hæmoglobin, leukocyttar, diff. teljing, trombocyttar, LDH og urat)

## Ávísingin

Ring fyrst til barnalækna um barnið

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Pædiatri - Illgruni um leukæmi" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026